# Heilsurenning í Klaksvík

**Komandi leygardag verður stór heilsurenning í Klaksvík. Luttakararnir fáa bæði møguleika at kanna eftir, hvussu hvussu stendur til við konditiónini og blóðtrýstinum, samstundis sum renningin er skipað sum ein kapping**

HEILSA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Leygardagin 9. apríl kl. 14.00 verður stór heilsurenning í Klaksvík. Tað er Føroya Shell í Norðoyggjum, sum saman við rennifelagnum Treysti skipar fyri. Umframt at renna, so kunnu luttakararnir, um teir ynskja tað, eisini mála blóðtrýstið - bæði áðrenn og aftaná tey hava runnið. Tað er Hjartafelagið, sum kemur at taka sær av hesari uppgávuni.

Áhugin fyri renning er nógv vaksin tey seinastu árini, og fyri hvørt ár, sær man fleiri og fleiri, sum renna og jogga. Hetta er bara gott, tí øll vita, hvussu umráðandi tað er at røra seg. Umframt at fáa fríska luft, so er tað gott fyri øll heilsutøl. Sjálvt um áhugin fyri renning er nógv vaksin, so eru tað fleiri, sum ikki fáa tikið seg saman, og tí halda fyrireikararnir tað verða eitt gott hugskot við hesum tiltaki.

### Fyri øll

Sum sagt, er tað rennifelagið Treysti, sum kemur at samskipa tiltakið og útflýggja teir startnummur á startinum, sum er á økinum uttan fyri Shellstøðina. Tiltakið byrjar kl. 14.00, og verður tað formaðurin í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar Kommunu, Rani Nolsøe sum setur kappingina í gongd. Runnið verður frá Shellstøðini og heimeftir Nólsoyar Pállsgøtu. Tá komið verður til Norðoya Sparikassa verður farið eftir Skúlavegnum og yvir til KFUM. Síðani verður runnið norður eftir Heygavegnum og oman gjøgnum Biskopstøðbrekkuna og norður aftur eftir Nólsoyar Pállsgøtu. Málið er á Shellstøðini. Av tí at tiltakið er ætlað øllum - eisini teimum sum ikki eru von at renna, er teinurin einans 3 km - tó verður eisini ein bólkur fyri rennarar, sum eru vanir at renna. Hesir rennarar renna teinin tvær ferðir - t.v.s. 6 km.

Føroya Shell í Norðoyggjum hevur gjørt avtalu við Hjartafelagið um at verða á staðnum áðrenn og eftir tiltakið, og fara tey at bjóða øllum teimum, sum renna, møguleikan at fáa mált blóðtrýstið - bæði áðrenn og aftaná, um áhugi er fyri tí.

### Eisini kapping

Samstundis sum hetta er ein heilsurenning, so verður tiltakið eisini skipa sum ein kapping, og tí verða luttakararnir bólkaðir soleiðis: Menn, kvinnur, dreingir sum eru føddir millum 93 og 98, gentur, sum eru føddar millum 93 og 98. Dreingir, sum eru føddir seinni enn 98 og gentur, sum eru føddar seinni enn 98. Umframt hesar bólkar, so kunnu veteranar eisini melda seg til. Hetta eru tey, sum eru fødd í 59 og áðrenn. Sum sagt, so verður eisini ein bólkur fyri rennarar, sum vilja royna teinin á 6 km.

Nummar 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki, og lutakast verður millum øll, sum hava runnið, har vinningurin er eitt Viðskiftakort á Kr. 1.000,- frá Føroya Shell í Norðoyggjum. Á málinum bjóðar Shellstøðin kaffi og Føroya Bjór vatn. Tilmelding til tiltakið, sum er ókeypis, kann gerast á Shellstøðini í seinasta lagi hóskvøldið 7. apríl.

Um áhugin vísur seg at verða fyri hesum tiltaki, er meiningin, at tað skal verða afturvendandi.

VÍF-VB 13-25

# Tryggur sigur til VB



Vágskvinnur vunnu ein tryggan sigur, tá ið tær leygardagin vóru og vitjaðu VÍF í Vestmanna. At sigurin skuldi gerast so mikið sannførandi, tí VB hevur havt tað rættuliga trupult móti VÍF fyrr í kappingarárinum, og eitt nú var um reppið, at vestmannakvinnur tóku VB á bóli í Vági herfyri.

Men leygardagin var eingin ivi, tí VB var nógv tað betra liðið.

Fyrstu 10 minuttirnar var VÍF omaná, men so tók VB seg saman og leyp avstað. Tær løgdu seg skjótt á odda við einum fimm málum, og so var spenningurin fokin.

Enn einaferð var Daiva Tomaite stóri spælarin hjá VB, tí hon við sínum 13 málum skeyt hon meiri enn helmingin av øllum málunum hjá VB.

**VÍF-VB 13-25(7-13)**

VÍF: Ioana Rapa 7, Torgunn Johansen 2, Alis Høghamar 1, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Linda Johannesen 1, Finngerð Jensen 1

VB: Daiva Tomaite 13(5), Rannvá Augustinussen 7, Gurið Mortensen 3, Christina Holm 1, Laila Jespersen 1

Brotskøst: VÍF 1(0), VB 5(5)

Útvísingar: VÍF 2, VB 2

Dómarar: Kristian Johansen og Dánjal Samuelsen

StÍF-Kyndil 22-16

# Strandakvinnur yvirhálaðu Kyndil

Við einum sigri á Kyndli leygardagin kom StÍF ájavnt við Kyndil í stigum á stigatalvuni í Sunset-kappingini, og av tí at strandakvinnur hava betur málmun, yvirhálaðu tær havnarliðið.

Í fyrra hálvleiki gekk tað annars rættuliga javnt á, og tað var Kyndil, sum var á odda við einum máli í steðginum.

Men í seinna hálvleiki tók StÍF sær um reiggj og vann ein tryggan sigur. Kyndil fekk bert tað eina málið fyrstu 18 minuttirnar av seinna hálvleiki, og hetta dugdi heimaliðið at gera sær dælt av.

**StÍF-Kyndil 22-16(9-10)**

StÍF: Rebekka Justinussen 7(1), Poula Olsen 5, Malan Petersen 5, Súnfríð B. Jacobsen 3, Rósa Johansen 1, Paula Høgnesen 1

Kyndil: Randi S. Wardum 6(1), Ann-Mari Wang 4(1), Hildur Høghamar 2, Linda Weihe 2, Kari-Ann Petersen 1, Ása Apol 1

Brotskøst: StÍF 3(1), Kyndil 3(2)

Útvísingar: StÍF 1, Kyndil 1

Dómarar: Hannis Wardum og Heri Petersen

### Formula-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 2 | Skála | 2 | 1 - 1 - 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 3 | KÍ | 2 | 1 - 1 - 0 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 4 | EB/Streymur | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 5 | HB | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 5 | 0 | 3 |
| 6 | NSÍ | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 7 | VB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 8 | B36 | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 1 | -1 | 1 |
| 9 | TB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 5 | -4 | 1 |
| 10 | GÍ | 2 | 0 - 0 - 2 | 4 | 6 | -2 | 0 |

SUNSET KAPPINGIN

### Sunset-kappingin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 9 | 9 - 0 - 0 | 740 | 451 | 289 | 31 |
| 2 | Stjørnan | 10 | 9 - 0 - 1 | 687 | 460 | 227 | 31 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 645 | 496 | 149 | 22 |
| 4 | Søljan | 10 | 5 - 0 - 5 | 644 | 555 | 89 | 18 |
| 5 | VÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 549 | 559 | -10 | 13 |
| 6 | StÍF | 10 | 2 - 0 - 8 | 522 | 643 | -121 | 9 |
| 7 | Kyndil | 10 | 3 - 0 - 7 | 470 | 640 | -170 | 9 |
| 8 | Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 314 | 767 | -453 | 0 |